## Tríggjar ferðir á odda

Fram til 88. minuttin í seinasta dystinum hevði HB bara tvær ferðir verið á odda í landskappingini. Eftir fyrsta umfar var HB fremst, og somuleiðis vóru teir fremst, tá teir í 12. umfarinum vunnu heimadyst móti VB/Sumba. Í aðrar mátar vóru teir ikki á odda, fyrr enn 27. og seinasta umfarið var liðugt. Av hinum 24 umførunum var B36 á odda einaferð, GÍ einaferð og so var tað annars EB/Streymur, sum í alt átti oddasessin 22 ferðir.

## Trummar bert fyri HB



Eitt av kendu andlitunum í Gundadali er uttan iva Oskar Eiriksson, sum aloftast hevur trummurnar við, tá HB spælir heima. Oskar er eisini kent andlit frá landsliðsfótbólti, men her hava trummurnar tagt í gott og væl eitt ár.

Eg eri keddur av at siga tað. Men við landsliðnum tapa vit hvørja ferð, og hóast vit royna at halda vónini, so er talan hvørja ferð um vónbrot. Tá er stuttligari at trumma við HB, tí vit vinna í hvussu so er av og á, sigur fyrrverandi Blackbirds-trummarin.

# Stabilitetur í langum banum

Ein tann svartasti dagurin hjá HB var uttan iva, tá teir tann 2. juli taptu við tennis-tølum móti grannunum úr B36. Men samstundis sum hetta sendi lagið í botn, so kann í dag staðfestast, at hetta var vendin hjá liðnum. Síðani tá hevur HB nevnliga ikki tapt, og tað vitnar um støðufesti, heldur Rasmus Nolsøe, sum alt árið hevur spælt í miðverjuni hjá HB.

- Síðani tá hava vit í øllum førum verið rættilgia stabilir. Fyrst og fremst, so settu vit okkum fyri, at nú skuldu vit stríðast meira. Tað eydnaðist, og sum kappingin leið, so høvdu vit – ein lítlan – møguleika fyri gullinum. Men vit vóru samdir um, at so leingi, sum tann møguleikin var til staðar, so skuldu vit stríðast fyri honum, og tað gjørdu vit.

- Og í dag vóru vit sum so rættiliga avkláraðir. Vit kundu ikki gera nakað av sjálvir, men vunnu vit okkara dyst, so kundu vit ikki gera meira. Og sjálvt um tað stóð nógv á, so eydnaðist tað – tíbetur, segði Rasmus.

# Vilja uppaftur

- Soleiðis sum dystirnir lagaðu seg, so kundi tað jú gera tað sama fyri okkum. Men vit spældu alla tíðina okkara møguleika.

Soleiðis segði Hanus Eliasen hjá ÍF, tá tað eftir seinasta umfarið stóð greitt, at ÍF varð niðasta liðið í Formula-deildini, og at teir tí noyðast eina deild niður at spæla komandi kappingarár.

- Men eg haldi so ikki, at tað eru teir báðir seinastu dystirnir, sum hava kostað okkum. Hesir hava verið móti EB/Streymi og HB, og hóast vit stóðu væl í báðum dystunum, so spurdist einki burturúr.

- Skulu orsøkir finnast, so eru tað nokk aðrir dystir, sum hava kostað meira. Ikki minst báðir heimadystirnir móti VB/Sumba og heimadysturin móti B68. Tað eru dystir, sum vit í dag iðra okkum um.

Tað er tó líkt til, at fuglfirðingar fegnir vilja upp aftur alt fyri eitt. Soleiðis kundi felagið longu leygardagin boða frá, at Nenad Saric, Alexandar Jovevic og Bartal Eliasen allir hava skrivað undir tvey-ára sáttmálar. Men spurdur, hvørt hann eisini fór at spæla við ÍF komandi ár, vildi Hanus einki siga.

- Hatta havi eg onga viðmerking til í løtuni, var einasta viðmerkingin, sum fekst um hetta.

HB-ÍF 2-0 (0-0):

# Tað ótrúliga he



HB

ÍF

**Spenningurin helt sær í 88 minuttir, men tá Vagnur Mohr Mortensen stútaði upp um útferðarrakta Íf-málverjin, fór FM-heitið til Havnar. Og í so máta var 2-0 málið hjá Rógva Jacobsen bert staðfestingin av, at bólturin enn er rundur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er nú ikki serliga ótrúligt í sjálvum sær, at HB er føroyameistari. Tað høvdu teir verið 18 ferðir undan leygardegnum, og tí bara styrktu teir um støðuna sum mest vinnandi felagið í landinum.

Men tað var nú ótrúligt, at spenningurin um Formula-gullið yvir høvur varð varveittur fram til seinasta leikdag. Seinastu nógvu umførini hevði EB/Streymur so væl og virðiliga verið á gullkós, men so hvørt sum teir á felagsliðnum hoyknaðu alt meira, trokaði sigursvanda HB seg alt nærri. Og tá teir á Toftum skoraði í 94. minuttinum stóð greitt, at spenningurin skuldi halda sær til tað seinasta.

### Kendu trýstið

Enn sum áður var tað tó EB/Streymur, sum hevði avgerðina í egnum hondum, men tað var tó ikki frítt, at HB tóktist darvað av trýstinum, tá seinasti dysturin varð blástur ígongd.

Móti einum ÍF-liði, sum púra greitt hevði í hyggju at verja og síðani dúva upp á kontra, megnaði HB sjáldan at skapa nakað serligt.

Kvika spælið, sum hevur eyðkent liðið stóran part av árinum, var mest sum ikki-eksisterandi. Eina løtu fyri steðgin var talan kanska um miðvíst trýst, men hetta komst tó einamest av, at ÍF hevði hug at bakka aftur í egnan brotsteig, og hetta tóktist eisini vera løtan, har HB skuldi avgera alt.

Men Jákup á Borg fekk ikki brotsspark, tá hann vildi. Bartal Eliasen tveitti seg niður í frmaúr blokaðu, tá Rókur av Fløtum Jespersen hamraði til retur-bólt, og tá Ólavur í Ólavsstovu meddaði móti samankomingini, stóð Andras Gango væl plaseraður, soleiðis at hann fekk jústað uppum.

### Boðini órógvaðu

Og spakuliga kom ÍF eisini meira við í dystin. Ikki minst mundi talan vera um góð tíðindi, tá tað frættist, at Skála hevði lagt seg á odda móti VB/Sumba, og bitið í mótálopunum gjørdist alt hvassari.

Serstakliga megnaði Hanus Eliasen fleiri ferðir at skapa órógv í HB-verjuni, eins og Christian Solberg hevði fleiri innlegg, sum væl kundu skapt nakrar møguleikar, um ÍF í størri mun hevði megnað at flutt fólk fram við, tá leitað varð móti HB-málinum.

Sum dysturin leið, tók HB alt meira yvir. Ivaleyst vistu fuglfirðingar eisini, at VB/Sumba hevði javnað á Skála, og tað merkti, at vónin um framhaldandi sunnudagsfótbólt var um at hvørva.

Og tá brølið úr HB-skýlinum avdúkaði, at KÍ hevði skorað, raknaði HB av álvara við. Tankin um at teir ikki megnaðu at gera sítt, sendi bylgdur gjøgnum alt liðið, sum støðugt flutti alt meira fólk fram. Jákup á Borg var beinleiðis óheppin, tá hann heldur enn at fáa brotsspark varð dømdur at vera rangstaddur – hann var minst ein metur on-side – og tá ÍF'ari mundi gjørt sjálvmál, hevði Gango eina framúr bjarging niðri við nærmara stólpa.

### Eydnan og gullið

Neglabondini mundu vera mest sum niðurbitin í HB-húsinum, tá frúgvin Fortuna brádliga sendi sítt stóra smíl móti teimum.